ítróttur

Nr. 34 • hósdagur • 19. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hondbóltsstøðan

Ein lítil feilur hevði sníkt seg inn í uppgerðina í blaðnum í gjár. Niðanfyri prenta vit stigatalvuna umaftur

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 381 | 348 | 33 | 13 |
| 2 | Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 378 | 343 | 35 | 12 |
| 3 | StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 316 | 307 | 9 | 9 |
| 4 | VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 345 | 326 | 19 | 8 |
| 5 | KÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 324 | 375 | -51 | 5 |
| 6 | H71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 314 | 359 | -45 | 4 |

# Mansliðið hjá Neistanum munandi skert

**Nú hondbóltskappingin er farin at líða væl, hevur mansliðið hjá Neistin mist lyklaleikarar í nakrar dystir**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Av mongum verður Neistin mett sum besta boðið upp á føroyameistaraheitið í 1. deild hjá monnum. Liðið liggur í løtuni næstfremst, bert tað eina stigið aftan fyri oddaliðið Kyndil, sum Neistin herfyri vann greiðan sigur á. Men nú týðandi og truplir dystir standa fyri framman, noyðist neistavenjarin, Dia Midjord, at ásanna, at nakrir av lyklaleikarunum ikki eru tøkir til nakrar av dystunum.

### Dragisa koykt fótin illa

Undir venjing týskvøldið var ein av sterku útlendingunum hjá Neistanum, Dragisa Stojovic, so óheppin at koykja sær fótin. Eftir kanningar á skaðastovuni kundi staðfestast, at talan ikki var um brot ella at nakað liðband var farið, men fóturin er illa koyktur, sigur Dia Midjord. Enn ber ikki til at siga, hvussu lang tíð gongur, áðrenn Dragisa verður tøkur aftur, men neistavenjarin roknar við okkurt um trimum vikum. Harafturat hevur ein annar av stórskjúttunum hjá Neistanum, Heini Hanusarson, aftur fingið trupulleikar við øksluni, og helst er talan um eitt liðband, ið er toygt. Dia Midjord sigur, at verður undir øllum umstøðum ikki við í dystinum móti vestmenningum komandi vikuskifti.

Eitt av álitunum í verjuni hjá Neistanum, er Karl Oddmar Rasmussen, og honum noyðist Neistin at verða fyriuttan í tríggjar vikur, tí hann skal av landinum, so ikki kann sigast annað, enn at neistaliðið er munandi skert næstu leikumførini.

Dia Midjord sigur, at hetta sjálvsagt er ein dyggur smeitur fyri Neistan, men tað er ikki so nógv at gera við tað. Hann hevur ongar ætlanir um at skunda undir at fáa menninar tøkar aftur, tí hann metur tað verða meiri umráðandi, at teir skaddu leikararnir eru púrasta frískir, áðrenn farið verður undir endaspurtin. Hetta loysir seg betur, enn at vit fáa teir tøkar, áðrenn teir eru heilt frískir, tí so kann skaðin koma aftur og gerast enn verri, sigur neistavenjarin at enda.



*Sterki bakkurin hjá Neistanum, Dragisa Stojovic, koykti sær fótin undir venjing týskvøldið og verður neyvan tøkur aftur fyrr enn um tríggjar vikur*
*Savnsmynd*

# Vindeygað framvegis víðopið

**Fótbóltsfeløgini vóru ikki sinnaði til á aðalfundinum leygardagin at avmarka tíðarskeiðini, tá ið spælaraflytingar kunnu vera millum feløgini**

FLYTINGAR VINDEYGAÐ
*Jóannes Hansen*

Uppskotið, sum FSF nevndin leygardagin legði fyri ársaðalfundin um, at avmarkingar í framtíðini skulu gerast fyri, nær spælarar skulu kunna flyta frá einum felag og til eitt annað, vann ikki frama. Ikki í fyrstu syftu í hvussu so er.

Aðalfundurin samdist um at taka málið av skánni. Hetta varð gjørt, uttan at stórvegis orðaskiftið var um málið. Um uppskotið fer at koma fram aftur, ella nær tað møguliga fer at síggja dagsins ljós aftur, var ikki greitt á fundinum.

Aðra staðni hava teir so kallað transfer vindeygu ella flytingar vindeygu, sum tað varð rópt í fundarskránni. Vindeygað er opið um summarið, tá ið tað er steðgur millum tvey kappingarár og so aftur um jóltíðir, tá ið tað nógva staðni er steðgur í kappingunum. Í Danmark er vindeygað um veturin opið í tveir mánaðir í desember og januar. Nógva aðra staðni í Europa er tað bara opið í desember og so aftur um summarið.

### Uppskotið um vindeygað

Kappingarnevndin kom upprunaliga við uppskotinum. Tað gekk út uppá, at flytingar frá útlandinum og frá einum felagi og til eitt annað skuldu verða loyvdar í átta vikur millum tvey kappingarár, og at tað í summarsteðginum skuldi verða loyvt at flyta frá fyrsta degi eftir síðsta dystin í fyrru hálvu og til tveir dagar undan, at farið varð undir seinnu hálvu. Kappingarnevndin ætlaðist at áseta dagfestingarnar í kunngerð, og reglan ætlaðist at verða sett í gildi eftir kappingarlok í ár.

Endamálið við avmarkingunum segðist millum annað at vera at veita feløgunum størri stabilitet, soleiðis at venjararnir og leiðslurnar í feløgunum í hampuliga góðari tíð skuldu vita av, hvørjar spælarar tey kundu roknað við.

FSF nevndin hevði tikið undir við uppskotinum hjá kappingarnevndini, og lógarnevndin hevði ongar viðmerkingar.

Aðalfundurin tóktist í hesum umfarinum at hava lítlan hug at viðgera málið, sum tískil varð tikið av skránni.

### Sáttmálarnir

Somu lagnu sum uppskotið um vindeygað fekk uppskot frá FSF um, at allir spælararnir nú skuldu vera avtaluleikarar. Uppskotið snúði seg um, at tað skuldi gerast til eina treyt, at tað millum allar spælarar í 1. og 2. deild og feløgini skuldu vera sáttmálar. Ætlanin var at gera tvær ymiskar standard avtalur. Onnur skuldi vera fyri spælarar, sum onga løn fáa uttan møguliga klæðir og skógvar, og hin skuldi vera tann, sum higartil hevur verið galdandi. Tað vil fyrst og fremst siga fyri teir, sum fáa løn ella peningaliga samsýning fyri at spæla fótbólt.

FSF metti, at henda broytingin fór at tryggja feløgunum eitt betri útgangsstøði, tá ið talan fór at verða um flytan av spælarum til annað føroyskt felag og ikki minst til útlandið. Mett varð eisini, at hetta fór at tryggja spælarunum meiri skipaðar og tryggjari umstøður, og at tað eisini fór at gerast léttari hjá spælarum at gerast avtaluleikarar í teirra egna felag. Hetta síðsta skal ivaleyst skiljast soleiðis, at tá ið felag ikki hevði havt høvi at fara í onnur feløg og í útlandi eftir spælarum, so hevði tað verið meiri upplagt at givið ungum spælarum, sum eru uppaldir í felagnum, møguleikan, enn tað ofta higartil hevur verið.

Eisini hesum uppskotinum frá kappingarnevndini hevði FSF nevndin tikið undir við, og lógarnevndin hevði heldur ongar viðmerkingar til hetta málið. Men aðalfundurin var ikki í hesum umfarinum sinnaður at geva hesum málinum stórvegis viðgerð, og tað varð tískil útsett.



# Gott lag á monnum í Spania

**Føroyska fótbóltslandsliðið er í hesum døgum á venjingarlegu í Spania. Sambært Jógvani Martin Olsen, hjálparvenjara, er gott lag á monnum, serliga eftir at endaliga avtala er gjørd við hollendska fótbótlssambandið um venjingardyst í juni**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Føroysku landsliðsleikararnir í fótbólti njóta góða spanska veðurlagið í hesum døgum. Sunnudagin leitaði føroyski hópurin sær til Cadiz í Spania, har teir skulu verða á venjingarlegu í tíggju dagar. Tveir venjingardystir eru eisini á skránni.



*Hendan myndin varð tikin á Svangaskarði, tá ið Jákup á Borg og liðfelagar hansara á føroyska landsliðnum vunnu 1-0 á Luksembourg í oysandi áarføri. Tá var Allan Simonsen landsliðsvenjari hjá føroyingum, men tá ið liðini hittast aftur týsdagin, er hann venjari hjá mótstøðuliðnum hjá føroyingum*
*Savnsmynd*

### Eingin dystur móti Andorra

Tá ið Sosialurin fekk fatur á Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjara, um døgurðatíð mikudagin, vóru teir júst komnir aftur frá venjing. Lagið var gott á monnum, og í góðveðrinum í Spania vóru allir mans til venjing, tí tað sjáldsama er, at eingin hevur nakran skaða at dragast við. Hjálparvenjarin sigur, at venjingarstøðið hjá monnum er á leið tað sama, ið tað plagar at verða um hetta mundi, og heldur ikki er nakar sjónligur munur á venjingarstøðinum hjá leikarunum, ið leika uttanlanda í mun til leikararnar úr heimligu kappingini.

Eftir ætlanini skuldi dystur verið leiktur móti Andorra í dag, men hesin dysturin verður av ongum, sigur Jógvan Martin Olsen. Tískil eru bert tveir venjingardystir á skránni á venjingarleguni. Tann fyrri verður leygardagin móti Pólandi, og tann seinni verður týsdagin móti fyrrverandi føroyska landsliðsvenjaranum, Allan Simonsen, og hansara monnum úr Luksembourg.

Um dystin móti pólverjum sigur hjálparvenjarin hjá føroyska landsliðnum, at tað óivað verður ein torfør uppgáva, hóast tað er eitt ligalandslið, ið Póland mynstrar. Tað vil siga, at tað bert eru leikarar úr heimligu kappingini í Pólandi, ið eru við. Føroyingarnir tosaðu týskvøldið við umboð fyri Póland, og har var sagt, at ligalandsliðið hjá teimum var nærum eins sterkt og eitt fullmannað A-landslið. Harafturat er hetta eitt kærkomið høvi hjá nógvum av teimum spælarum, sum vanliga standa í skugganum av pólsku stjørnunum í útlandinum, at vísa sínar dygdir. So uttan iva verður tað ein trupul uppgáva, ið bíðar føroyska landsliðnum, tá ið teir fara á Bahia Zur vøllin í San Fernando leygardagin seinnapartin at dystast við pólverjar.

Seinni dysturin á venjingarleguni verður, sum áðurnevnt, týsdagin móti liðnum hjá Allan Simonsen, Luksembourg. Hetta verður sjálvsagt ein stuttlig uppgáva hjá okkara landsliðsleikarum, nú teir skulu royna seg móti liðnum hjá fyrrverandi venjara sínum. Føroyingar hava tvær ferðir áður leikt móti Luksembourg, nevnliga tá ið vit vóru í bólki saman við teimum í undankappingini til HM í 2002. Tá vunnu føroyingarnir 1-0 á heimavølli, tá Jens Kristian Hansen skoraði upp á brotsspark stutt fyri leiklok í oysandi áarføri á Svangaskarði. Á útivølli gekst enn betur, tí tá vunnu okkara menn 2-0 við málum sum Kurt Mørkøre og Christian Høgni Jacobsen skoraðu. Dysturin í Luksembourg var eisini serligur á tann hátt, at tað var seinasti dystur, ið Todi Jónsson leikti á føroyska landsliðnum. Hagtølini vísa sostatt, at móti Luksembourg hava føroyingar altíð fingið 100 prosents úrtøku, og vónandi kann tað staðfestast eftir dystin týsdagin.

### Dysturin móti Hollandi er ótrúliga motiverandi

Sum tað eisini hevur verið nevnt í fjølmiðlunum í seinastuni, hevur FSF fingið eina innbjóðing til at spæla vinardyst móti Hollandi í Lausanne í Juni mánaða stutt undan, at Holland skal til EM-endaspælið í Portugál. Nú er endaliga staðfest, at dysturin verður veruleiki, og tað eru stór tíðindi hjá føroysku landsliðsleikarunum.

Vanligani hevur føroyska fótbóltssambandið roynt at fingið dystir í juni mánaða, tá ið samráðingar um leikskránna í bólkaspælum hevur verið. Soleiðis var eisini herfyri, tá ið samráðingar vóru um, hvussu spælast skuldi í HM-bólki okkara, men tíverri eydnaðist tað ikki føroysku umboðunum at fáa nakran dyst í juni, og tí var tað ógvuliga kærkomið at fáa dystinum móti Hollandi. Annars hevði eingin landsdysturin verið á skránni aftur fyrr enn eftir summarsteðgin, og tað hevði verið ov long tíð, heldur Jógvan Martin Olsen.

Hjálparvenjarin sigur, at dysturin móti Hollandi er ein gularót hjá føroysku spælarunum, og tá má verða ótrúliga motiverandi at hava ein slíkan dyst at síggja fram til. Tað er ikki hvønn gerandiskostur hjá føroysku leikarunum at fáa høvi til at leika ímóti so stórum stjørnum sum Ruud van Nistelrooy úr Manchester United, Patrik Kluivert, Edgar Davids, Michael Reiziger, Philip Cocu úr Barcelona, Clarence Seedorf úr Milan, og vit kundu hildið fram, tí listin er nærum óendaligur.

Somuleiðis heldur Jógvan Martin, at tað er ein stór viðurkenning av føroyska landsliðnum og avrikum tess at ein so stór fótbóltstjóð sum Holland bjóðar okkum av, beint áðrenn teir skulu leika um evropameistaraskapið.

Somuleiðis hevur føroyska fótbóltssambandið eitt ynski um, at tað fer at bera til at fáa ein venjingardyst í lag í august mánaða, tá ið europeiska fótbóltssamgongan UEFA hevur sett onkran dag av til landsdystir. Jógvan Martin Olsen sigur, at so vítt hann veit, hevur tað enn ikki eydnast hvørki dønum ella norrmonnum at fáa nakra avtalu um venjingardyst henda dag, og tað hevði verið ótrúliga stuttligt at leikt móti aðrari av teimum báðum grannatjóðunum, sigur hann í telefonini úr Cadiz.



*Nú hevur Allan Simonsen høvi til fyri fyrstu ferð at ogna Luksembourg ein sigur móti sínum gamla liðið úr Føroyum*